HENDUR IÐ SLEPTU

# Johannes Christian Dam:
# Verfaðir Martin Joensen, rithøvund

**Tey eru ikki nógv, sum hava starvsheiti á gravsteininum. Tað eru nærum bert skiparar, eisini í kirkjugørðum uttanlands. Men ein av skiparunum á Svínaryggi er Johannes Christian Dam**

Johannes Christian var føddur í Havn 21.6. 1879. Foreldrini hjá honum vóru Poulina Magnussen og Cornelius Christian Dam. Hann var doyptur 17.8 1879, og hann varð fermdur 1.4. 1894 í Havnar Kirkju.

Johannes giftist 2.4. 1907 í Havnar Kirkju við Cathrine Fredrikke f. Heinesen f. 3.7. 1879 norðuri við Strond í Klaksvík.

Tey búsettust upp í Tróndargøtu, í húsunum beint omanfyri Evangeliihúsið.

Fredrikka vaks upp saman við Magnus Sivert Simonsen í Haraldssundi. Hann flutti til Havnar og er umrøddur í hesi røð.

Fredrikka kom til Havnar ung at arbeiða hjá Johan Restorff, skipara og bakara, son gamla M.C. Restorff. Tá kom hon ofta inn til Magnus Sivert. Hon fekk gott eygað á Johannes Christian, sum búði nærindis. Tey hava verið nakað smæðin, so hon sendi honum eitt bræv um sínar kenslur, og hetta gav úrslit! Tá ið tey giftust fekk hon brúðarkjólan í gávu frá Johan Restorff.

Johannes var eisini limur í losjuni í Havn. Hann var við á eini útferð hjá losjuni 2. hvítusunnudag í 1904. Mynd frá hesi útferð er á síðu 55 í 100 ára minningarbókini hjá losjuni Støt Viljen.

Johannes Christian var sjómaður og koma víða um. Hetta sæst m.a. av innbúgvi sum var keypt í Edinburgh og aðra staðni. Hann sigldi við hvalabáti, men kom til skaða um borð. Seinni fór hann at arbeiða sum loðsur.

Johannes Christian gekk á skiparaskúla í 1901 hjá Jens í Dali. Millum kendar menn, hann gekk í skúla saman við, kunnu nevnast Jens Pauli í Dali, sonur Jens, brøðurnar Jákup Hendrik og Jens Klæmint Isaksen av Viðareiði, Mortan J. Mortensen av Argjum, skipari á Nýggjaberg vanlukkutúrin í 1942, og Marius Rein, abbi tann Marius, sum vit kenna.

Heilsuna fekk Johannes ikki aftur, og hann doyði í 1920, bara 41 ára gamal. Eftir sat Fredrikka við 5 børnum í aldrinum 5 til 12 ár.

Sakførarin Poul Effersøe, beiggi Rasmus, báðir umrøddir fyrr í hesi røð, bleiv verji hjá børnunum og skuldu tey vísa seg hjá honum hvønn sunnudag, hóast hann var sjúkur og seingjarliggjandi. Fyri at kunna hyggja út í urtagarðin, hevði hann eitt stórt spegl hangandi yvir seingina

Eingin hjálp var tá hjá einkjum, og so var at finna okkurt til lívsins uppihald. Vanliga fóru einkjur at arbeiða fisk, men Fredrikka sá, hvussu trupult hetta var hjá einligum mammum. Hon fekk sær tískil pensjonat heima hjá sær sjálvari í Tróndargøtu. Her kundu børnini eisini vera til hjálpar.

Fredrikka var einkja í nærum 50 ár. Á eldri árum fór hon til Klaksvíkar til dóttrina Onnu Elisabeth og doyði í 1969. Hon er tískil jarðað í Klaksvík.

Tey bæði fingu fimm børn, sum fingu eftirnavnið Bjørgheim. Tey vóru:

**Pouline Cornelia** f. 18.2. 1908, kallað Lina: Poul Effersøe vildi ættleiða Linu, men tað vildi mamman ikki.

Lina hjálpti heima og átók sær eisini starv sum boðgenta á Telefonstøðini bert 12 ára gomul. Aftaná barnaskúlan helt hon fram á Telefonstøðini, til hon giftist.

Lina giftist í Havnar kirkju tann 30. desember 1931 við Martin Joensen (1902-1966) úr Sandvík. Tey áttu børnini Regin og Ásu.

Tá Lina og Martin vóru gift fluttu tey fyrst til Sandvíkar og síðan til Tvøroyri. Lina doyði 23.2. 1990 og er grivin á Tvøroyri.

Martin var ein kendur rithøvundur. Hann skrivaði skaldsøgurnar Fiskimenn í 1946, Tað lýsir á landi í 1952. Hann skrivaði eisini stuttsøgusøvnini Útrák í 1949, Klokkan ringir í 1962, Heimadoktarin í 1977 og Gamli maðurin og varðin í 1977.

I Den åbne Enclypædi verður sagt at "Martin Joensen kan regnes for den fornemste realistiske skildrer af livet på Færøerne i 1920-erne og 1930-erne. Hovedværket er Fiskimenn og Tað lýsir av landi, hvis konfliktfyldte handling afspejler en opløsning af gamle sammenhænge i en samtids nedgangsperiode."

Martin var eisini eitt skifti blaðstjóri á Sosialinum og var eisini virkin javnaðarmaður.

**Anna Elisabeth** f. 23.8 1909. Lisa, sum hon var kallað, hjálpti eisini mammuni á pensjonatinum. Aftaná barnaskúlan tænti Lisa nøkur ár í gamla bókahandli, hjá Mitens og hjá Juhlert, postmeistara.

Seinast í 20-unum fór hon norður til familjuna í Haraldssundi í húspláss.. Tá møtti hon Poul Juel Rasmussen, í Grótinum, i Klaksvík. Tey giftust í 1931 og fingu børnini Torleiv, Hjørleiv, Johannes, Erlu, Jógvan Fróði, Gunnleyg og Birgir.

Hjørleiv, Erla og Gunnleyg eru saman við Birgar Johannesen og N.J. Arge keldur til hesa grein.

Lisa doyði 22. juli 1980.

**Hansina Helene Sofie**, vanliga kallað Hassa f. 25. juni 1911. Fekk saman við systkjunum navnabroyting til Bjørgheim tann 3. mars 1928.

14 ára gomul fór hon at arbeiða á Telefonstøðini, har systir hennara Lina eisini arbeiddi. Har var hon til 1946.

Undir krígnum møtti Hassa bretska hermannin Reginald Ribton, kallaður "Rex". Tey giftist, fluttu til Onglands og búsettust í Bordon Hampshire.

Hassa og Rex áttu sonin Frederic Johannes Bjørgheim. Hann hevur javnan vitjað í Føroyum.

Hassa andaðist 25 desember 1989, 78 ára gomul. Hon er grivin í Bordon Hampshire í Onglandi.

**Johanna Fredrikka** f. 19.9 1914. Giftist við Evald Torp úr Danmark. Hann var tænari, og tey búðu skiftivís í Íslandi og Danmark. Í Íslandi var hann tænari á tí kenda Hotel Borg í Reykjavík. Tey fingu ein son. Tey endaðu sínar dagar í Íslandi.

**Johannes Ferdinand** føddur 19.11 1915. Hann gekk burtur í 1942. Tá ið hann var liðugur at ganga í skúla i Havn, fór Johannes sum kokkadrongur við Tjaldrinum. Seinni fór hann at læra til kokk, og tá ið útbúgvingin var liðug, fór hann aftur at sigla.

Hann fórst við A.P. Møller skipinum, Peter Mærsk, sum tann 7. desember 1942 varð torpederað á veg úr Bretlandi til Norðurafrika.

Skipið var lastað við fólki og stríðsútgerð til sameindu deildirnar, sum skuldu reka og róku týskarar úr Norðurafrika. Tað var týski kavbáturin U 185, sum beindi fyri Peter Mærsk. So Johannes gjørdist ein av teimum mongu føroyingum, sum gávu sítt lív í stríðnum móti nasistunum.






*Brúðarparið Cathrina og Johannes Christian Dam*



*Skiparaflokkurin hjá Johannes Christian.*
*Sitandi f.v. Marius Rein, Tórshavn, Poul Hansen, Mikladali og Jóannes Joensen, Vestmanna*
*Í miðjuni: Jákup Hendrik og Jens Klæmint Isaksen, Viðareiði, Jógvan Joensen, Syðradali, Birtu Jógvan Johannesen, Miðvági og Johannes Christian Dam.*
*Aftast: Mortan Mortensen, Argir, Jens Pauli og Jens í Dali, Clæmint og Símun Dávur Clementsen, Syðradali og Christian Joensen, Tórshavn.*

**Komandi partur**
Í komandi parti um tríggjar vikur verður greitt frá Hansinu á Lag og Johan Hendrik Jacobsen og teirra ætt.